

## Hickersberger er kroystur

Tá ið Føroyar vunnu tiltikna sigurin á Eysturríki í Landskrona, æt venjarin hjá Eysturríki Josef Hickersberger. Hann fekk eftir tapið á Føroyum sekkin, men nú er hann aftur landsliðsvenjari hjá Eysturríki. Fríggjakvøldið var um reppið, at hann upplivda eina endurtøku av Landskrona-dystinum, tí Liktinstein var á odda í dystinum ímóti Eysturríki, sum við bit og slit tó vann 2-1. Nú er Hickersberger undir trýsti áðrenn venjingardystin ímóti Sveis í kvøld. Eysturríki er annar av vertunum fyri EM-endaspælinum í 2008, og tí spælir landið ikki við í undankappingini.

## Íslendingur vil keypa West Ham

The Times skrivar í dag, at ein íslendingur hevur givið fótbóltsfelagnum West Ham eitt tilboð um at yvirtaka felagið. Íslendingurin, sum talan er um, skal verða Eggert Magnusson, sum er formaður í íslendska fótbóltssambandinum. Magnusson ætlar sær at leggja 400 milliónir krónur av sínum egnu pengum í eitt tilboð, sum samanlagt ljóðar á 800 milliónir krónur.

- Hetta er ongan veg komið enn. Vit hava víst okkara áhuga, men tað er nógv eftir enn, sigur Eggert Magnusson

# Kramnik hótti við at rýma frá HM-dysti

**Tvey talv resta í HM-dystinum millum Veselin Topalov og Vladimir Kramnik. Støðan er 5-5, og sannur dramatikkur hevur valdað handan leikpallin**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Áðrenn vit hyggja nærri at talvgongdini, venda vit eyguni ímóti dramatikkinum. Í stuttum – og við fyrivarni – kann sigast:

Aftan á fjórða talvið klagaði máttmikli venjarin og umboðsmaður Topalovs, Silvio Dainalov, vegna Topalov um nøkur serlig viðurskifti. Óbeinleiðis klagaði Team Topalov um, at Kramnik nýtti tøkniliga hjálp. Dainalov segði, at Kramnik var óneyðuga ofta á baðirúminum. Upp til 25-50 ferðir meðan telvað varð. Baðirúmið er einasta staðið í bygninginum, sum ikki hevur sjónvørpu.

Ein skrivlig klaga um hesi viðurskifti, umframt nøkur ynskir, komu á klaguborðið hjá altjóðu talvsamgonguni FIDE.

Kramnik og hansara menn vórðu sjálvsagt skelkaðir av ákærunum. Kramnik segði, at hann nýtti rúmliga baðirúmið til at ganga runt í og hugleiða um talvið, meðan Topalov hugsaði um sínar leikir.

Í fyrstu atløgu fekk Topalov viðhald í, at teir skuldu hava eitt felags baðirúm, heldur enn eitt í part. Kramnik mótmælti við at ikki møta upp til fimta talvið. Topalov vann tískil talvið uttan at flyta ein leik.

Talvheimurin var nú á gosi. Topalov og hansara menn eru skurkar, ið einans skapa seg fyri at ávirka Kramnik, ljóðar ein atfinning. Eisini á kjaktorginum á www. faroechess.com, eru nógvar hvassar meiningar at lesa. Tey flestu meina, at talan er um skitið sálarligt spæl og trýst.

Kramnik hevur fingið stuðul frá mongum sterkum stórmeistarum, eitt nú frá Anatoly Karpov, Viktor Korchnoi og Peter Svidler.

Eftir fleiri áheitanir, valdi Kramnik at halda fram, hóast hann hótti við at gevast í ótíð. Kramnik fekk sítt egna baðirúm aftur og teir kundu halda fram. Men tapið í 5. talvinum stóð við.

Ein øgiligur hurlivasi, sum ikki minnir okkum sørt um Fischer-Spassky í 1972, tá Fischer klagaði um alt frá stólum til ljósviðuskifti. Munurin er tó, at Topalov – og kanska serliga Dainalov – fór beinleiðis eftir mótstøðumanninum.

Helst eru onnur viðurskifti í hesari sak, sum vit ikki vita um. Í øllum førum tykjast Topalov og Kramnik sinnaðir at avgera dystin við talvborðið, og á myndum frá HM sæst einki til illvilja hjá Kramnik mótvegis Topalov.

**Óstøðugt og spennandi**

Topalov legði út sum ein leyva fyrstu tvey talvini. Hann hevði góðar støður, men tað varð Kramnik, sum vann bæði talvini. Eftir tveir javnleikir, kom øll orrustan undan fimta talvinum. Kramnik helt á við góðu telvingini í sætta og sjeynda talvinum, sum bæði endaði jøvn.

Men so kom vend í. Topalov fekk við eitt øgiliga orku og telvaði sum ein heimsmeistari næstu tvey talvini. Hann vann sær leiðsluna og tey væntaðu at Kramnik var knekkaður. Mong mettu, at ákærurnar um snýt hevði svøltað Kramnik. Men so varð als ikki. Í 10. talvinum vann Kramnik leikandi lætt.

Topalov hevur skapt tey flestu talvini. Hann hevur telvað álopssinnað og til tíðir vakurt. Men Topalov hevur eisini gjørt óskiljandi feilir. Kramnik hevur verið sum vant varin. Hevur ikki skarað fram úr, men hevur hinvegin ikki leikt so nógvir feilir.

Støðan er 5-5 áðrenn 11. talvið, sum verður telvað í dag, 10. oktobur. Hósdagin verður tólvta og seinasta talv telvað. Endar dysturin javnur, verður kviktalvsumdystur leiktur og møguliga eisini snartelving.





*Kramnik og Topalov telva spenanndi og hendingaríkan HM-dyst ímóti hvørjum øðrum*

*Mynd: Polfoto*

## Talvið hesa vikuna

**Topalov,V (2813) - Kramnik,V (2743)**
**HM (9. talv), 07.10.2006**

1.d4 d5 2.c4 c6 3.Rif3 Rif6 4.e3 Bf5 5.Ric3 e6 6.Rih4 Bg6 7.Rixg6 hxg6 8.a3 Ribd7 9.g3! Be7 10.f4! (g3 og f4 hugskotið hevur Topalov fingið frá ein av sínum hjálparum, GM Francisco Vallejo. Ætlanin er m.a. spakuliga at kroysta svørtu støðuna) 10...dxc4 11.Bxc4 0–0 12.e4 b5 (Kramnik og Topalov hildu báðir aftan á talvið lítið um hendan leik. Kramnik segði seg ikki hava nakra ætlan og valdi tískil at skumpa b-finnuna frameftir. Rib6 var helst ein betri roynd) 13.Be2 b4 14.axb4 Bxb4 15.Bf3 Fb6 16.0–0 e5 17.Be3 (Svartur tykist ikki at hava fingið nakað munagott burtur úr Fb6 og e5-ætlanini) 17...Rad8 18.Ria4 (Aftan á talvið segði Kramnik, at longu um hetta mundið helt hann seg hava tapta støðu!) 18...Fb8 19.Fc2 exf4 20.Bxf4 Fb7 21.Rad1 (Topalov telvar nú sera sannførandi. Kettan er farin eftir músini) 21...Rfe8 22.Bg5 Be7 23.Kh1 Rih7 24.Be3 Bg5 25.Bg1 Rihf8 26.h4 Be7 27.e5! (Hvat kann svartur gera?) 27...Rib8 28.Ric3 Bb4 29.Fg2 Fc8 30.Rc1 Bxc3 31.bxc3 Rie6 32.Bg4 Fc7 33.Rcd1 Rid7 34.Fa2! Rib6 35.Rf3 Rif8? (Ein feilur í nærum vónleysari støðu. Kramnik er í villareiðu) 36.Rdf1 Re7 37.Be3 Rih7 Støðumynd





**Støðumynd eftir 37…Rih7**

38.Rxf7! Rid5 (38…Rxf7 39.Rxf7 Fxf7 40.Be6) 39.R7f3 Og Kramnik tímdi ikki at telva víðari við finnu færri og nógv verri støðu 1–0

| | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Veselin Topalov** | 2813 | 0 | 0 | = | = | (1) | = | = | 1 | 1 | 0 | 5 |
| **Vladimir Kramnik** | 2743 | 1 | 1 | = | = | (0) | = | = | 0 | 0 | 1 | 5 |